

# BØRN Í BILINUM

## - og í ferðsluni

Í samstarvi við:

betri TRYGD

RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

# Lógin

## Øll skulu vera íbundin

Ferðslulógin ásetir, at øll í bilinum skulu vera íbundin.  Bilførarin hevur ábyrgd av, at børn undir 15 ár eru rætt íbundin. Børn undir 135 cm skulu vera íbundin í góðkendari trygdarútgerð, sum hóskar til vekt og hædd.

## Klipp í koyrikortið

Tað kostar eitt klipp í koyrikortið, um
- børn undir 15 ár ikki eru íbundin
- børn undir 135 cm ikki eru íbundin í góðkendari trygdarútgerð, sum hóskar til vekt og hædd.

Børn undir 3 ár mugu als ikki vera í bili, um trygdarútgerð, tillagað til vekt og hædd, ikki er í bilinum.

### Tilráðingar

| | |
|---|---|
| **Pinkustólur:** | **0-13 kg (uml. 0-1 ár)** |
| **Barnastólur:** | **9-18 kg (uml. 9 mðr.-4 ár)** |
| **Bilpúta við stólabaki:** | **15-36 kg (úr uml. 4 árum)** |

**Vaksin skulu sjálvsagt eisini altíð sita íbundin.**

# Stoytkoddi*

**Børn og stoytkoddar hoyra ikki saman.** Mælt verður til, at børn skulu vera í minsta lagi 140 cm fyri at sita við ein virknan stoytkodda. Stoytkoddin er gjørdur til at verja vaksin, og hann verður sendur út við í minsta lagi 300 km/t, tá samanstoytur er. Børn kunnu fáa álvarsligt mein av stoytkoddanum, og tað hjálpir ikki at seta barnið hægri við barnastóli ella bilpútu – megin í stoytkoddanum er tann sama.

**Gev gætur! Børn í bakvendum bilstóli hava ikki loyvi at sita við virknan stoytkodda!**

# Børn undir 140 cm

Børn mugu ongantíð sita í bakvendum bilstóli við ein virknan stoytkodda. Tað er bæði ólógligt og lívshættisligt. Ráðið fyri Ferðslutrygd mælir frá, at børn undir 140 cm sita við stoytkodda, sama hvønn veg bilstólurin vendir.

# Børn yvir 140 cm

Børn yvir 140 cm kunnu sita framman, um tey kunnu nýta vanliga trípunktsselan í bilinum uttan eykaútgerð. Drag setrið heilt aftur, so fjarstøðan til stoytkoddan er sum longst.

# Síðustoytkoddar

Síðustoytkoddar eru vandaleysir fyri børn, sum eru rætt íbundin. Hvørki børn ella vaksin eiga tó at hvíla høvdið móti hurðini, um síðustoytkoddar eru.

# Kopla stoytkodda frá

Í nøkrum bilum kanst tú kopla stoytkoddan frá við einum lykli, í øðrum skal tað verða gjørt á einum góðkendum bilverkstaði. Les í leiðbeiningarbókini til bilin, hvussu tú bert teg rætt at.

* stoytkoddi = airbag



## Tilráðing

**Keyp bert góðkenda útgerð og vel ein handil, har tú fært serkøna ráðgeving. Tak barn og bil við, so handilsfólkið kann vísa tær, hvussu útgerðin skal nýtast.**

PINKUSTÓLUR
0 - 13 kg
● Stoytkoddi* er bannaður



# Pinkustólur
## 0-13 kg (0-1 ár)

**Bakvendur pinkustólur er tryggasta loysnin.** Við bakvendum pinkustóli minkar vandin munandi fyri skaða á háls og nakka á barninum, um bilurin er fyri frontalum samanstoyti.

## Stødd og vekt

Pinkustólur kann brúkast, frá barnið er nýføtt. Les nýtsluvegleiðingina gjølla fyri at tryggja tær, at bæði barn og pinkustólur eru rætt spent. Barnið er vaksið úr pinkustólinum, tá høvdið kemur upp um kantin á stólinum, ella tá barnið vigar meira enn hámarkið, sum er merkt á stólinum. Hetta er vanliga, tá barnið er millum 8 og 13 mánaðir.

## Isofix

Pinkustólurin kann spennast fastur við isofix-festi ella við trygdarbeltinum. Hevur bilurin isofix-festi, verður mælt til at nýta isofix-pinkustól, tí vandin fyri skeivari ísetan er minni.

## Boxetta ella lyftnet

Tvær aðrar góðkendar loysnir eru til at flyta pinkubørn í bili: Boxettan er eitt slag av pinkubarnalyft við beltum, og lyftnet er til at spenna lyftina fasta. Hvørgin teirra er eins trygg og pinkustólurin, m.a. tí at barnið liggur tvørt av ferðslukósini. Tí verður mælt til einans at nýta hesar loysnir til børn við serligum tørvi, sum ger, at tey ikki kunnu nýta pinkustól. T.d. børn, sum eru fødd ov tíðliga. Tosa við læknan ella heilsufrøðingin, um tú ivast.

## Stoytkoddin* skal vera óvirkin

Set ongantíð pinkubørn framman fyri ein virknan stoytkodda. Tað er ólógligt og kann vera lívshættisligt.

**Les meira um bakvendan bilstól á s. 12 og á www.rff.fo.**

* stoytkoddi = airbag




# Fest bilstólin rætt

Kanningar í grannalondum okkara vísa, at í meira enn triðja hvørjum føri er annaðhvørt bilstólur skeivt festur ella barnið skeivt íbundið, tí er sera týdningarmikið altíð at lesa nýtsluleiðbeiningina til bilstólin. Allir bilstólar kunnu ikki nýtast í øllum bilum, og bilstólarnir eru ofta bert góðkendir til ávís pláss í bilinum. Tí er sera umráðandi at tryggja sær, at bilstólur og bilur hóska saman.



**BAKVENDUR**
9 - 18 kg
● Stoytkoddi* er bannaður



**FRAMVENDUR**
9 - 18 kg
● Stoytkoddi* verður frámældur

# Barnastólur
## 9-18 kg (9 mðr.- 4 ár)

**Tá ið barnið er vorðið ov stórt til pinkustólin, skal tað brúka barnastól.**
Barnastólar eru at fáa framvendir og bakvendir.

## Framvendur ella bakvendur

Mælt verður til at brúka bakvendan barnastól, so leingi sum til ber, og helst til barnið er 3-4 ár. Bakvendur barnastólur er tryggari, tí barnið situr við bakinum frameftir. Vandin fyri skaða á háls og nakka minkar munandi við bakvendum barnastóli, um bilurin er fyri frontalum samanstoyti. Ein bakvendur barnastólur krevur eitt sindur meira pláss enn ein framvendur, men tað ber til í flestøllum bilum.

**Les meira um bakvendan bilstól á s. 12 og á www.rff.fo.**

## Isofix

Barnastólurin kann spennast fastur við isofix-festi ella við trygdarbeltinum. Hevur bilurin isofix-festi, verður mælt til at nýta isofix-barnastól, tí vandin fyri skeivari ísetan er minni.

## Stoytkoddi *

Tað er bannað at hava eitt barn í bakvendum bilstóli framman fyri ein virknan stoytkodda. Situr barnið í framvendum barnastóli, verður mælt frá stoytkodda.

* stoytkoddi = airbag




# Bint barnið rætt í

Trygdarbeltið skal vera stramt og liggja gjøgnum beltistýrið við økslina og undir smáu ørmunum á bilpútuni, sum halda trygdarbeltinum niður móti mjadnunum. Liggur trygdarbeltið tvørtur um búkin, er vandi fyri álvarsligum skaða á gøgn, um bilurin rennir á.



**BILPÚTA VIÐ STÓLABAKI**
15 - 36 kg
Stoytkoddi* verður frámældur



**BILPÚTA**
15 - 36 kg
Stoytkoddi* verður frámældur

# Bilpúta við stólabaki
## 15-36 kg (úr 4 árum)

**Í 3-4 ára aldri eru børn flest vaksin úr barnastólinum, og tá er tíð at skifta til bilpútu við stólabaki.** Bilpútan er ein hørð púta, sum lyftir barnið upp, soleiðis at trygdarbeltið liggur rætt um herðarnar og um mjadnarnar. Stólabakið verjir høvdið á barninum sum ein nakkastuðul og stuðlar høvdinum væl, um barnið sovnar. Stólabakið gevur harumframt síðuvernd.

Brúka bilpútu við stólabaki, til barnið er í minsta lagi 135 cm. Tá hevur barnið loyvi at nýta vanligt trygdarbelti, men mælt verður til at halda fram at nýta bilpútu, til barnið er 150 cm høgt ella vigar 36 kg, um barnið situr betur á bilpútu enn uttan.

# Bilpúta bert í trípunktsbelti

Bilpúta kann bert nýtast á setri við vanligum trygdarbelti (trípunktsbelti). Tað er ólógligt at nýta bilpútu saman við mjadnabelti (tveypunktsbelti).

Bilpútur eru eisini at fáa við isofix-festi. Hevur bilurin isofix-festi, verður mælt til at nýta eina isofix-bilpútu.

# Børn yvir 135 cm

**Tá barnið er 135 cm, hevur tað loyvi at nýta vanligt trygdarbelti,** men mælt verður til at halda fram at nýta bilpútu við stólabaki, til barnið er 150 cm høgt ella vigar 36 kg, um barnið situr betri á bilpútu enn uttan. Skift bara til bilpútu uttan stólabak, um barnið er ov høgt til stólabakið, tað er, um høvdið fer upp um kantin.

# Børn á framsetrinum

Einki lógarásett aldursmark er fyri, nær børn kunnu sita á framsetrinum, men Ráðið fyri Ferðslutrygd mælir til, at børn eru í minsta lagi 140 cm og kunnu nýta vanligt trygdarbelti fyri at sita á framsetrinum við ein virknan stoytkodda. Viðmælt verður at draga stólin heilt aftur, so frástøðan til stoytkoddan er sum longst.

## Tilráðingar

**Lat ongantíð barnið smoyggja skákbeltið undir armin ella aftur um bak. Tað kann vera lívshættisligt í samanstoyti!**



# Bakvendur bilstólur

**Bakvendur bilstólur veitir barninum bestu trygdina.** Tí eiga børn at sita í bakvendum bilstóli sum longst, og helst til tey eru 4 ár.

Kanningar vísa, at hjá smábørnum er tryggast at sita í bakvendum bilstóli. Smábørn hava lutfalsliga stórt og tungt høvd í mun til restina av kroppinum (Uml. 25 % í mun til 16 % hjá einum 6 ára gomlum, kelda: Trygg Trafikk). Samstundis eru vøddar og beinagrind minni ment enn hjá størri børnum og vaksnum.

## Í bakvendum bilstóli

Tá ið barnið situr í bakvendum bilstóli, verða kroppurin og høvdið trýst ímóti stólabakinum í einum frontalum samanstoyti. Megin frá samanstoytinum verður javnað út á ein størri flata, so trýstið verður minni. Høvd og nakki fáa lítlan og ongan baksláttur.

## Í framvendum bilstóli

Tá ið barnið situr í framvendum bilstóli, verður rørslan í nakka og høvdi stór í frontalum samanstoyti, tí høvdið verður slongt fram, samstundis sum trygdarbeltið heldur kroppinum føstum í bilstólinum. Nakkavøddarnir kunnu verða toygdir so mikið, at tað hevur varandi mein við sær. Barnið fær eisini ein harðan baksl:áttur við nýggjum trýsti á nakka og høvd.

Talvan vísir, hvørja skaðafyribyrgjandi ávirkan ymsu loysnirnar við trygdarbelti hava sammett við at sita óbundin *(kelda: Trygg Trafikk, Noreg):*

**Ávirkan við ymsum trygdarskipanum**

| | |
|---|---|
| Bakvendur bilstólur | **90-95 %** |
| Framvendur bilstólur/bilpúta | **50-60 %** |
| Trygdarbelti (einsamalt) hjá børnum undir 10 ár | **20-30 %** |
| Trygdarbelti hjá vaksnum | **50-60 %** |




## Kopla stoytkoddan* frá

**Tað er ólógligt og lívshættisligt at hava ein bakvendan bilstól við ein virknan stoytkodda. Tí skal stoytkoddin altíð vera koplaður frá, um ein bakvendur bilstólur stendur á einum setri við stoytkodda. Kann stoytkoddin ikki koplast frá, skal bakvendi bilstólurin á baksetrið.**

* stoytkoddi = airbag

# Isofix

**Isofix er ein serstøk skipan til at spenna ein bilstól í bilin uttan trygdarbelti.** Í staðin fyri at spenna bilstólin fastan við trygdarbeltinum í bilinum, kanst tú við isofix klikkja stólin í tvey metallfesti, sum eru fjald millum stólabakið og setrið í bilinum. Harumframt hevur isofix-bilstólurin ofta eitt triðja stuðulspunkt – vanliga eitt stuðulsbein, sum stuðlar niður á gólvið í bilinum. Framvendir isofix-bilstólar skulu ofta festast við einum stroppi (tether) afturum stólaryggin á bilinum.

Bilstólar fáast bæði við og uttan isofix. Nýggir bilar hava flestallir isofix, og mælt verður til at nýta isofix-bilstól, um bilurin hevur hesa skipan. Isofix-bilstólar eru vanliga léttir at festa í bilin, og vandin fyri at festa stólin skeivt er tí lítil.

# Góðkenningar

**Bilstólar skulu í Føroyum hava eina evropeiska góðkenning,** t.e. eina E-góðkenning við ECE 44-03, ECE 44-04 ella i-Size. Fyri fastmonteraðar bilstólar eitur góðkenningin ECE (R) 44-05.  ”E”-ið kann eisini verða skrivað sum eitt lítið ”e”. Finn E-merkið og tryggja tær, at tvey tey fystu tølini undir/ aftan á E-merkið eru 03 ella 04, ella at stólurin er merktur við i-Size, sum er nýggj bilstólagóðkenning.

Hevur stólurin ikki eitt av nevndu góðkenningarmerkjunum, er ólógligt at nýta hann.

Ex 03xxxx    Ex 04xxxx

i-Size

E-GÓÐKENNINGIN ECE R44-03, ECE R44-04 og ECE (R) 44-05 er ein evropeisk góðkenning. “E”-ið kann eisini verða skrivað sum eitt lítið “e”. Tryggja tær, at tvey tey fystu tølini undir/ aftan á E-merkið eru 03 ella 04.

**Les meiri um børn í bili og i-Size á www.rff.fo.**

# Bilstólur og bilur skulu hóska saman

Legg til merkis, at allir bilstólar ikki kunnu nýtast í øllum bilum, og bilstólarnir eru ofta bert góðkendir til ávís pláss í bilinum. Tí er sera umráðandi at tryggja sær, at bilstólur og bilur hóska saman. Spyr sølufólkið um tað.

# Á ferð við stovninum

**Tá ið børn á stovni ella í dagrøkt skulu flytast í bilum, galda somu reglur, sum tá koyrt verður í privatbilum.** Summir stovnar hava kortini onga útgerð, og ein møguleiki er tí, at foreldrini sjálv fáa útvegað útgerð.

# Í bussi

Bussar, sum eru skrásettir síðani 1999, skulu hava trygdarbelti í øllum setrum, býbussar tó undantiknir. Meginreglan er, at eru trygdarbelti í bussinum, skulu tey verða brúkt. Tá stovnur skal túr við bussi, skulu børn úr trimum árum vera íbundin, um trygdarbelti eru í bussinum. Ráðið fyri Ferðslutrygd mælir til, at stovnar og skúlar einans brúka bussar við vanligum trípunktsbelti, og at tey sita íbundin við aldurssvarandi trygdarútgerð.

Børnini eru tryggast, um tey sita íbundin við aldurssvarandi trygdarútgerð. At kalla eingin trygdarútgerð til børn er góðkend til mjadnabelti, so umráðandi er at tryggja sær frammanundan, at bussurin hevur trípunktsbelti.

Ansa eftir, at børnini ikki smoyggja skákbeltið undir armin ella afturum bak – hetta kann vera lívshættisligt í samanstoyti.

# Í hýruvogni

Nýtir stovnurin ella dagrøktin hýruvogn, kann avtala gerast við eitt hýruvognsfelag um at hava tøkar barnastólar og bilpútur. Annars kunnu børnini hava sína egnu útgerð.

Er góðkend útgerð tøk til børn undir 3 ár, skal hon verða nýtt. Børn eldri enn 3 ár skulu verða spent føst við vanliga trygdarbeltinum á baksetrinum ella við serútgerð, um hon er til. Tá ið tú bíleggur hýruvogn, kanst tú spyrja, um tey hava barnaútgerð til túrin.

**Les meira um "Á ferð við stovninum" á www.rff.fo.**

# Rætt og skeivt
# – soleiðis spennir tú barnið

## Trygdarbeltið skal sita rætt á bilpútuni

Hevur tú eitt stórt barn, sum sjálvt bindur seg í trygdarbeltið, lær so barnið at leggja trygdarbeltið undir beltistýrið (smáu armarnar) báðumegin á bilpútuni og at stramma trygdarbeltið. Minst til at kanna við jøvnum millumbilum, at barnið er rætt íbundið.




**Skeivt:** Trygdarbeltið liggur oman á beltistýrinum (smáu ørmunum á bilpútuni).




**Rætt:** Trygdarbeltið liggur undir belti-stýrinum (smáu ørmunum á bilpútuni).

## Stramma trygdarbeltið

Trygdarbeltið skal vera so stramt, at tú júst fært eina flata hond millum beltið og barnið. Um trygdarbeltið ikki er nóg stramt, er vandi fyri, at beltið ikki megnar at halda barninum, um óhapp hendir. Snúður má ikki vera í trygdarbeltinum.




**Skeivt:** Snúður er í trygdarbeltinum, og tað er leyst.




**Rætt:** Trygdarbeltið liggur flatt og stramt.




**Skeivt:** Trygdarbeltið er alt ov leyst.




**Skeivt:** Snúður er í trygdarbeltinum.




**Rætt:** Trygdarbeltið er strammað just so mikið, at ein fløt hond fæst millum beltið og barnið.

## Skákbeltið skal sita rætt

Skákbeltið skal altíð liggja tvørtur um økslina øðrumegin, og liggja gjøgnum beltistýrið vil økslina.




**Skeivt:** Skákbeltið liggur undir arminum. Tað kann vera lívshættisligt, tí at skákbeltið kann oyðileggja gøgn í samanstoyti.




**Skeivt:** Skákbeltið liggur aftan fyri bakið. Yvirkroppurin á barninum verður ikki hildin aftur, um óhapp hendir.




**Rætt:** Skákbeltið liggur framman fyri barnið og tvørtur um økslina øðrumegin.



# Ferðsla og skúlabyrjan

Tá ið barnið byrjar í skúla, eigur tú sum avvarðandi at læra barnið at bera seg rætt at í ferðsluni og saman við barninum at finna tryggastu leiðina í skúla. Stytsta leiðin er ikki altíð tryggasta leiðin. Ven tí skúlaleiðina í summarfrítíðini so ofta, sum til ber, áðrenn barnið byrjar í 1. flokki.

Fylg barninum í skúla fyrstu skúladagarnar. Vís á allar hugsandi ferðsluvandar á leiðini, og lær barnið einfaldastu ferðslureglurnar. Farið ein túr afturat, tá ið heystið kemur, og gangið teinin í myrkri. Tosa við barnið um, at hóast tað sær bilin, sær bilførarin ikki barnið í myrkrinum. Brúka tí altíð endurskinsvest, tá myrkt er. Ger endurskinsvestin til ein líka natúrligan part av skúlaútgerðini sum skúlataskan, matpakkin og pennahúsin.

# Góð ráð til foreldur um børn í ferðsluni

- **Gev barninum fáar og einfaldar reglur til at ferðast í ferðsluni.**
- **Er gongubreyt, lær barnið at ganga har og ikki á vegnum.**
- **Er eingin gongubreyt, bið barnið tá ganga móti ferðsluni so uttarlaga í vegjaðaranum, sum til ber.**
- **Lær barnið altíð at steðga á og hyggja báðar vegir, áðrenn tað fer út á vegin.**
- **Er gonguteigur, lær barnið at brúka hann, tá ið tað skal tvørtur um vegin.**
- **Skal barnið tvørtur um vegin, er best at fara har, sum vegurin er beinur, og sýnið er gott.**
- **Bið barnið ansa serliga væl eftir, tá ið tað fer út á vegin millum parkeraðar bilar ella aðrastaðni, har barnið ikki sæst væl.**
- **Lær barnið at ganga kvikliga tvørtur um vegin heldur enn at renna.**
- **Ger barnið sjónligt í myrkri við endurskinum á skúlatasku og klæðum.**
- **Lær barnið um týdningin av at nýta súkkluhjálm – og ver ein góð fyrimynd.**
- **Ger eftir ásetingunum hjá skúlanum um ferðslu kring skúlan.**

# Endurskin

**Endurskin eru týdningarmikil, tá tú gongur í myrkri í ferðsluni. Serliga umráðandi er at nýta endurskin um veturin, tá myrkt er stóran part av samdøgrinum.**

## Góðkenning

Mælt verður til einans at nýta endurskin við evropeisku góðkeningini EN 1150 ella EN 13356. Tað er fyri at lúka treytina um, at endurskinið skal síggjast úr 140 metra fjarstøðu.
Endurskinsvestar til arbeiðsnýtslu skulu verða merktir við góðkenningini EN 471 ella EN 20471.

## Hvar skulu endurskinini festast?

Endurskinini skulu vera fest lágt, so billyktirnar raka á tey. Tey eiga at vera sjónlig frá øllum síðum. Ansa eftir, at taskur, turriklæði o.a. ikki kemur fyri endurskinini. Eitt gott hugskot er at seta endurskin á taskur, barnavognar og hundin.

## Leys endurskin

Leyst endurskin skal hanga í einum bandi, so tað sveiggjar aftur og fram, tá tú gongur ella rennur. Best er at hava eitt endurskin á hvørjari síðu.

## Endurskin á beinunum

Endurskin rundan um beinini eru góð, tí tey síggjast væl úr øllum ættum. Til ber at nýta endurskin at festa um beinini ella at seyma endurskinsbond á buksurnar.

# Endurskinsvestar

Børn eru í lyktahædd, og tí síggjast tey væl, um tey eru í endurskinsvesti. Eisini hjá vaksnum eru endurskinsvestar hentir, tá tú ert til gongu, á súkklu ella á rennitúrinum.





# Børn og súkklur

Tað er sunt, umhvørvisvinarligt og stuttligt at súkkla, men tó ikki vandaleyst. Fyri at minka um vandan fyri óhappi, eigur tú:

- at kenna ferðslureglurnar fyri súkklur
- at tryggja tær, at súkklan er í góðum standi og hevur kravdu útgerðina
- at tryggja tær, at tú verður sædd/ur við at stilla teg rætt á vegnum og nýta lyktir í myrkri
- at vera í bjørtum litum – gjarna flúrglógvandi (fluorescerandi) – so tú sæst.

Álvarsligastu skaðarnir í súkkluóhappum eru høvuðskaðar, tí er týdningarmikið at verja høvdið við hjálmi.

# Súkkluhjálmur

**Súkkluhjálmurin skal vera merktur við CE og hava evropeiska góðkenningarmerkið EN 1078.**

Skal hjálmurin veita bestu verjuna, skal hann hava rætta støðd og sita væl á høvdinum. Hann skal verja pannu, nakka og tinningar. Eisini skal hjálmurin sita fastur á høvdinum, so hann ikki flytur seg.

# Hvussu nýta vit hjálm?

- Hjálmurin skal sita vatnrættur á høvdinum. Umleið tveir cm skulu vera millum eygnabrýr og framkantin á hjálminum.
- Reimarnar skulu vera so strammar, at hjálmurin situr fastur, men tveir fingrar fáast ímillum.
- Síðureimarnar skulu samlast við síðuspenninum beint undir oyralippuni og ikki við høkuna.
- Hevur hjálmurin fingið harðan stoyt, er hann ikki tryggur, men má skiftast út.
- Tað kann vera vandamikið at klintra ella spæla í súkkluhjálmi, tí hann kann verða fastur. Tí skal hjálmurin takast av, tá liðugt er at súkkla.

# Fimm leiðreglur

1. Nýt altíð góðkenda trygdarútgerð, ið hóskar til hædd
2. Ansa eftir, at bæði bilstólur og barn eru rætt íbundin – fylg nýtsluvegleiðingini neyvt
3. Set barnið í bakvenda útgerð so leingi, sum til ber
4. Tak bil og barn við, tá ið tú keypir útgerð
5. Set ikki børn undir 140 cm við ein virknan stoytkodda

**Les meira um børn í bili og í ferðsluni á www.rff.fo**

Útgáva: November 2019

SENDISTOVAN

Í samstarvi við:

betri

TRYGD

RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD

J. H. Schrøters gøta 7 · Postboks 3209 · 110 Tórshavn
Tel 220 064 · rff@rff.fo · **www.rff.fo**